# 200 og Katla



*Væl kendu og hart spælandi 200 fara saman við Katla at hava konsert í Tórsgøtu tann 25. juli*

**Hesir eru tveir av bólkunum, sum fara á pall í Havn, tá Futt í Býin verður tann 25. juli í Tórsgøtu**

**TÓNLEIKUR**
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Ólavsøkuhýrurin byrjar longu 25. juli í ár, Tá Futt skipar fyri konsert í Tórsgøtu. Tveir av bólkunum, ið eru við, eru 200 og Katla:

200 varð stovnað í 1996 í sambandi við fløguna „Rock í Føroyum 2". Niels, Uni og Mikael spældu allir við bólkinum „Mold" og vildu royna okkurt øðrvísi. Í 2001 gav 200 fyrstu fløguna út, 200%. Í hesum tíðarskeiðnum búðu Niels og Uni í Keypmannahavn og Mikael í Føroyum, og aktiviteturin var hareftir. Tó varð spælt bæði í Føroyum, Danmark og Íslandi tá. Í mars 2005 varð „Viva La Republica" upptikin og givin út. Hendan fløgan fekk enn betri ummæli enn hin fyrra, og lagið „Muscleman-blað" gjørdist nr. 1 á 15 teimum bestu í 8 vikur. Tónleikurin hjá 200 snýr seg oftast um føroyskan politikk, og við argandi, speirekandi tekstum verða nógv evni lýst á ein øðrvísi hátt.

## Katla

Katla er ein nýggjur føroyskur bólkur, ið spælir nýskrivaðan instrumentalan tónleik.

Talan er um jazz kendan tónleik, sum fevnir frá sveimandi ljóðmyndum, til tango og sprudlandi jazz.

Tað er keyboardmaðurin í bólkinum, Magnus Johannessen, sum hevur skrivað allan tónleikin.

Hann hevur áður útgivið tónleik við bólkum sum Plúmm og Greengate, men roynir seg nú við nýggjum tónum saman við spildur nýggjum bólki.

Bólkurin er sprottin úr eini trio ið kallast „Trio Magnusar", sum seinstau mánaðirnar hevur verið fast húsorkestur á Hvonn, sum hevur skipað fyri jazz tiltøkum. Men nú er henda trio vaksin til eina kvintett, og teir sum manna bólkin eru: Magnus Johannessen – Keyboards, Rógvi á Rógvu-Trummur, Edvard N Debess – Bass, Ólavur Olsen – Trompet, Dávur J. Magnussen – trombon.

Til hesa konsertina kann áhoyrarin vænta sær eina spennandi ferð gjøgnum tónlistarlig hugløg, framført av nøkrum av royndastu tónleikarunum í Føroyum.




## Starv á Hagstovuni

Vit sóknast eftir einum dugnaligum fólki til íbúgvahagtøl og arbeiðsmarknaðarhagtøl.

Arbeiðið umfatar bæði rakstur av verandi hagtalsskrá og menning av nýggjum hagtølum um evnini. Nýggju verkætlanirnar fara fram í samstarvi við KT deildina á stovninum.
Tú verður partur av einum stovni, sum hevur informasjón til høvuðsstarv, og tú fært høvi at hava alt verkið um hendi - heilt frá tanka til útgávu.

**Førleikar**
Talan er um fulltíðarstarv, sum krevur analytiskar førleikar, akademiska ella tilsvarandi útbúgving og gott KT skil.
Vit seta tær onga formliga treyt um serliga útbúgving, men gera kortini vart við, at vit hava tørv á væl lærdum og dugnaligum fólki.
- Akademisk útbúgving í hagfrøði ella samfelagsfrøði er ein fyrimunur.
- Góð evni til KT er eisini fyrimunur.

Vit rokna við, at rímiliga rúm tíð fer til at læra stovnin og arbeiðslagið at kenna, at læra um hagtøl og um nýggju uppgávurnar. Tað vit bjóða tær, er eitt áhugavert starv, í samstarvi við dugnaligar og væl vitandi starvsfelagar.

**Umsókn**
Lønin er sambært galdandi sáttmála millum landsstýrið og avvarðandi fakfelag.
**Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 18. august** og kann bæði sendast sum teldupostur og vanligt postbræv.

Vilt tú hava meira at vita um størvini og møguleikarnar, ring so á Hagstovuna – 352800 – og bið um at tosa við Jógvan Bærentsen (fartel.: 581878) ella Hermann Oskarsson (fartel.: 225038).

HAGSTOVA FØROYA
KVÍGGJARTÚN 1 · POSTRÚM 2068 · FO-165 ARGIR
TLF. +298 35 28 00 · FAX + 298 35 28 01 · HAGSTOVAN@HAGSTOVAN.FO · WWW.HAGSTOVAN.FO

SENDISTOVAN